**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Umhvørvis- og Vinnumálaráðið**
**uvmr@uvmr.fo**

Tórshavn 9. juni 2022

Okkara tilv./Our ref.
/Havbxn-HBF---Ummxli-av-broytingar.docx
Tykkara tilv./Your ref.

## Ummæli av kunngerð um broyting í kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy

Havbúnaðarfelagið takkar fyri møguleikan at ummæla broytingar í kunngerð um virking av alifiski í Suðuroy. Felagið tekur undir við uppskotnu broytingini, sum ger skipanina nakað smidligari enn í dag, samstundis sum hon tryggjar, at sama nøgd av alifiski verður virkað í Suðuroy.

Samstundis skal felagið tó vísa á, at tá broytingin í alilógini, sum gav heimild fyri kunngerðini, var til ummælis, vórðu hesar prinsipiellu viðmerkingar gjørdar:
*"Talan er um eitt stórt og heilt óvanligt inntriv í verandi virksemi. Ein slík áseting ber boð um eina vinnupolitiska hugsan frá farnum tíðum, við politiskari stýring av, hvar og hvussu framleiðslan skal vera skipað fyri at skapa arbeiðspláss. Feløgini undirmeta ikki á nakran hátt teir trupulleikar, sum Suðuroyggin hevur í mun til restina av landinum, men at fara at lóggeva framleiðsluforðingar inn í eina vinnu, sum er í harðari altjóða kapping, er ikki til gagns fyri hvørki føroyska samfelagið ella Suðuroynna. Um framleiðsla skal vera í Suðuroy so skal tað vera tí tað loysir seg búskaparliga."*

Havbúnaðarfelagið hevur framvegis somu prinsipiellu støðu til málið.

Vinarliga
Vegna nevndina í Havbúnaðarfelagnum

Niels Winther